# TROLINGIN Á LANDLEIÐINI

Rógvi Mouritsen og Hjalti í Jákupsstovu

smárit FRS 6/89

Fiskirannsóknarstovan november 1989

**Samandráttur.**

Í hesum áliti verður tikið samanum ta vitan, ið er til taks um summartrolingina á landleiðini, við tí fyri eyga, at koma við einum tilmæli um hvussu hesin fiskiskapur eigur at skipast í framtíðini.

Hetta er gjørt úr teirri vitan, ið er til taks á Fiskirannsóknarstovuni, royndarfiskiskapi í 1989, og við at spyrja menn við drúgvum royndum í hesum fiskiskapi.

Niðurstøðan er, at veiðan av tungu, reyðsprøku, havtasku og steinbíti í summartrolingini kann verða eitt virðismikið íkast til landsbúskapin, um rætt verður atborði, og tí eigur at halda fram.

Treytin er tó tann, at bátarnir leggja seg eftir at fiska hesi fisksløg, og ikki tosk og hýsa, sum ofta hevur verið gjørt.

Fyri at tryggja hesum verður mælt til at loyva fiskiskapi á leiðum har tunga og rut annars vanliga fáast og ikki á leiðum har mest rundur fiskur fæst.

Eisini verður mælt til at loyvda hjáveiðan av rundum fiski verður avmarkað. Ein máti er at áseta eina mest loyvdu nøgd fyri alla veiðitíðina fyri hvønn bát, og at báturin missir veiðiloyvi restina av tíðini tá henda er veidd. Ein annar máti er at áseta eina mest loyvda hjáveiðunøgd í prosent av allari veiðini fyri hvønn túr sær. Henda eigur tá at broytast við mánaðunum.

Besta meskavíddin í troling eftir tungu er 120 mm, og mælt verður til at loyva hesa í summartrolingini. Við hesi meskavídd, fæst tó smáur toskur og hýsa, og skal vinningurin í tungu ikki fara fyri skeyti í at veiða hesi fiskasløg ov ung, er avgerandi neyðugt, at avmarkingar í hjáveiðu av hesum báðum fiskasløgum verður gjørd. Viðmerkjast skal, at teir, ið hava drúgvar royndir á landleiðini, hava holla vitan um, hvar flatfiskur og rut er at fáa.

**Inngangur.**

Við trolingini innanfyri 12. fj. var upprunaliga ætlanin, at bátarnir serliga skuldu leggja seg eftir tungu, reyðsprøku, steinbíti og havtasku. Men tó hevur tað víst seg, at bátarnir serliga hava lagt seg eftir rundum fiski. Í talvuni niðanfyri er víst veiðan av teimum fýra fiskasløgunum íalt í summartrolingini í 1984, 1987 og 1988 og veiðan fyri alt Føroyaøkið somu árini. Hagtøl fyri 1985 og 1986 eru tíverri ikki tøk.

Veiðan av tungu, reyðsprøku, havtasku og steinbíti í summartrolingini og fyri alt Føroyaøkið í árunum 1984, 1987 og 1988.

| | Summartrolingin | | | | Føroyaøkið | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | TU | RSP | HVT | STB | TU | RSP | HVT | STB |
| 1984 | 571 | 148 | 104 | 89 | 1209 | 457 | 714 | 331 |
| 1987 | 254 | 114 | 77 | 39 | 415 | 373 | 544 | 255 |
| 1988 | 245 | 74 | 135 | 54 | 449 | 367 | 644 | 264 |

Av talvuni sæst, at av tungu er umleið ein helvt av árligu veiðuni fiskað í summartrolingini, meðan av hinum fiskasløgunum er bert ein lítil partur veiddur í hesum fiskiskapi.

Veiðan av tungu hvørt ár síðan 1924 er sett í mynd 1. Henda vísur eina árliga meðalveiðu uppá 973 tons. Afturat skal leggjast veiðan av havtasku, reyðsprøku og steinbíti (Mynd 2, 3 og 4), í meðal ávikavist 550, 235 og 220 tons árliga. Hesi fiskasløg eru við skilagóðari hagreiðing dýr og kunnu geva eitt munandi íkast til landsbúskapin.

Víðkanin av minst loyvdu meskavíddini í troling undir Føroyum frá 1. januar 1989 úr 135 mm í 155 mm fer at raka trolveiðina eftir flatfiski, serliga eftir tungu, meint. Tunga er somikið mjá, at bert tær allar størstu verða veiddar við 155 mm meska.

Skal veiðan eftir tungu tí hava lív lagað, verður neyðugt at gera undantak frá minst loyvdu meskavíddini. Samstundis verður høvi at endurskoða alla trolingina innan fyri 12 fj. úr landi við tí fyri eyga at fáa fiskiskapin meira miðvíst beindan eftir flatfiski og ruti heldur enn eftir rundum fiski.

Fiskirannsóknarstovan hevur síðan síðst í seksti árunum gjørt nógvar trolroyndir eftir flatfiski (sí t.d. Joensen, 1970), og ruti undir Føroyum, og nógv vitan um, hvar flatfiskur og rut er at fáa, er til taks. Í sambandi við víðkanina av meskunum varð í 1989 trolbáturin "Skarðhamar" úr Skopun leigaður til enn eina roynd. Ætlanin við hesi royndini var at skráseta leiðir har flatfiskur og rut fekst uttan at íblandingin av toski og hýsu varð ov stór, og at royna, hvør meskavídd var best egnað at fiska

tungu við.

Eisini er í summar gjørd ein spurnaðarkanning millum menn, ið hava drúgvar royndir við troling á landleiðini, fyri at fáa so nógva vitan til vega sum gjørligt um tungu og flatfiskaleiðir annars.

Í hesum skrivi er roynt at draga samanum, soleiðis at Landssýrið kann hava best møguligt grundarlag undir ásetanini av reglum fyri trolingini á landleiðini framyvir.

**Meskavíddin.**

Minst loyvda meskavíddin fyri trol undir Føroyum hevur verið ymisk gjøgnum árini. Til 1974, 105 mm, í tíðarskeiðnum 1974-1978, 120 mm, 1978-1988, 135 mm og frá 1 januar 1989, 155 mm.

Fyri fiskasløg sum reyðsprøku, havtasku og steinbít hevur meskavíddin í posanum ikki so stóran týdning. Men í fiskiskapi eftir tungu harafturímóti, er neyðugt at nýta eina minni meskavídd enn 155 mm. Hetta vísa tær kanningar Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt, bæði í 1989 og árini frammanundan.

Fyri at kanna nærri hvør meskavídd, 120 mm ella 135 mm, er best egnað í trolingini innanfyri, varð í roynduni við "Skarhamri" í 1989 skift millum trol við hesum báðum meskavíddunum í posanum.

Tunga.

Meðalveiðan í kg. per tóvtíma á tveimum økjum, annað eystanfyri Nólsoynna, hitt vestanfyri Sandoynna, við ávikavist 120 og 135 mm meskavídd í posanum er víst á mynd 5. Á hesari sæst týðiliga, at veiðan í nøgd av tungu er munandi størri við 120 mm meskum í posanum enn við 135 mm.

Longdarbýtið av tungu veidd við 120 mm og 135 mm meskum býtt eftur kyni (Mynd 6.) vísur at meðallongdin fyri kvennfisk veiddar við 120 mm meskum liggur um 32 cm, meðan hon við 135 mm liggur um 35 cm. Fyri kallfisk er meðallongdin ávikavist uml. 31 cm og 34 cm. Av tí, at kvenntunga verður størri enn kalltunga við sama aldur, er eisini ein munur í kynsbýtinum tá veitt verður við ymsum meskavíddum. Við 135 mm meska var 78% av veiðuni av tungu kvennfiskur og bert 22% kallfiskur. Við 120 mm meska harafturímóti var kynsbýti 50% av hvørjum.

Aldursbýtið (Mynd 7.) vísur, at við 120 mm meskavídd í posanum verður tunga 5 ár og eldri veidd, meðan við 135 mm verður bert kvennfiskur 6 ár og eldri veiddur. Tá tunga er 5 ár er hon kynsbúgvin og vøksturin er farin at minka, og tolur tí hesin stovnur fulla roynd tá.

Niðurstøðan er tí heilt greið tann, at best nýtiliga meskavíddin at veiða tungu við er 120 mm.

Toskur.

Meðalveiðan í kg. per tóvtíma av toski (Mynd 5.) var størri eystan fyri Nólsoynna við 120 mm meskum í posanum, enn við 135 mm., og minni vestanfyri Sandoynna. Longdarbýti (Mynd 8.) av toski veiddur við ávikavist 120 mm og 135 mm vísti, sum væntað, at við 120 mm meska í posanum

varð væl av fiski undir 50 cm veiddur (37% var undir 50 cm), men eisini við 135 mm var hampuliga stórur partur (24%) undir 50 cm.

Annað.

Av hýsu verður meira fiskað av smáum við 120 mm meska enn við 135. Av hvítingi, fæst meira, men hetta er fiskur, ið annars bert fæst við línu í løtuni, og sum helst tolir meira roynd. Viðvíkjandi havtasku, steinbíti og reyðsprøku hevur tað helst ikki so stóran týdning, um roynt verður við 120 mm ella 135 mm meskavídd.

Niðurstøða.

Sum víst frammanfyri, kann útvið 1000 t. av tungu veiðast undir Føroyum árliga, og av hesum tann størra helvtin innan fyri 12 fj. markið. Skulu vit fiska hetta, er neyðugt at nýta 120 mm meskavídd í trolinum. Ein vansi við hesum er, at um eingin avmarking verður sett í mest loyvdari hjáveiðu av toski og hýsu, kann nógvur smáfiskur av hesum báðum fiskasløgum verða veiddur í hesum fiskiskapi, soleiðis at samfelagið tá missur størri virðir í at hesin fiskur verður veiddur ov smáur, enn vinningurin av tunguni. Mælt verður tí til, at loyva troling á landleiðini á sumri við 120 mm meskavídd í posanum; men at samlaða hjáveiðan hjá hvørjum báti av toski og hýsu ikki má vera størri enn eitt ávíst minsta % í vekt, tó lagað eftir veiðimánaða, sí annars heildarniðurstøðuna seinni.

**Økir.**

Við tí fyri eyga, at savna sum mestu vitan um tey ymsu troløkini innanfyri 12 fj. eru menn við drúgvum royndum við troling á landleiðini spurdir til ráðs.

Teir sum, í hesum sambandi, tosað hevur verið við, eru:
Petur Debes í Havn,
Karlo Joensen í Miðvági,
Jákup Petur Jacobsen í Fuglafirði,
Andreas Ludvig á Tvøroyri,
Árni Hansen í Sørvági og
Hans Marius Joensen í Skopun.

Av tí, at "Skarðhamar" varð leigaður til royndir í 1989, er serliga nógv vitan fingin frá Hans Marius Joensen.

Umframt, frá hesum, er eisini væl av kunnleika frá Arnold Henriksen á Fiskirannsóknarstovuni, ið hevur verið við til nógvar rannsóknir og fiskiroyndir á landleiðini.

Út frá samrøðunum og vitanini á Fiskirannsóknarstovuni eru niðanfyri umrødd tey troløki innan fyri 12 fj., ið talan kann vera um at loyva fiskiskap á. Fyri hvørt eru sett tey ýti, ið mælt verður til skulu nýtast at avmarka økini við (Sí eisini kort 1).

Svínoyarhavið. (Øki A1 og A2)

Markini eiga at vera:

90° rv. úr Bispinum og

90° - - úr Skorini, frá 12 fj. inn at 6 fj. úr landi. Økið kann vera opið alla veiðitíðina. Frá byrjan til 15 juni eisini inn at 4 fj. úr landi.

Á hesum øki er nógv til av teimum fiskasløgum sum trolingin á landleiðini er ætla at fiskað. Toskur og hýsa fæst tó eisini her, og vanliga er umleið ein triðingur til ein helvt av veiðuni toskur.

Norðoyingar við smærri útróðrarbátum royna í Svínoyarhavinum við línu um summarið. Serliga er hetta eftir hvítingi frá juni mánaði. Hetta órógvar teir ymsu veiðihættir nakað, men vanliga hava ikki størri trupulleikar tikið seg upp. Trolbátarnir vita nær línubátarnir koma, og geva seg tá ofta undan.

Í Svínoyarhavinum er fyri tað nógva góður trolbotnur, líka inn um 4 fj. úr landi. Har er bæði bleytur botnur, sandbotnur og harðbotnur. Men í støðum er eisini ringur botnur við tindum, har trol ikki fæst at ganga.

<u>Eystan fyri Nólsoynna.</u> (Øki B).

Markini eiga at vera:

90° rv. úr Skorini
117° - - úr Borðuni, frá 12 fj. markinum inn at 6 fj. úr landi.

Økið eigur at vera opið alla veiðitíðina.

Hetta er ivaleyst tað økið, sum hevur mest av bleytum botni, á føroyska landgrunninum. Her er nógv tunga, reyðsprøka, havtaska og steinbítur. Hjáveiðan av toski er lítil, umleið 20 til 40 prosent, Men hetta er ofta smátt fallandi fiskur, frá 50 til 65 cm.

Her er góður botnur nógvastaðni, og gott at tóva, men eisini eru nógvir tindar, og øki við ringum botni og harðbotni. Tí eru ymsar rásir, sum so við og við eru funnar, brúktar at tóva eftir.

Økið verður lítið brúkt av øðrum enn trolarum. Kønir menn tóva líka frá sunnara markinum, og norður ígjøgnum, eftir fleiri ymsum tóvum. Tað er tí umráðandi, at alt økið millum tey gomlu markini er opið. Í 1989 var ein stórur partur av økinum burturskorin. Hetta var til stórt fortreð fyri trolararnar og til lítla og onga gleði fyri annan reiðskap .

Hýsan kemur har suðuri í økinum í august/september, og nakað av hvítingi fæst eisini har suðuri frá juli. Einki serligt toskarend er í økinum. Eisini innari enn 6 fj. úr landi, bæði norðan fyri og sunnan fyri Húsagrynnuna (Larvasagrynnu) eru góð troløki.

<u>Landsynning úr Borðuni og eystur úr Skálhøvda</u> (Øki C).

Á hesum øki hevur ikki fyrr verið loyvt at trola í summartrolingini.

Uppskot um mark eru:

90° rv. úr Borðuni
117° - - úr Skálhøvda, frá 12 fj. markinum inn at 5

fj. úr landi.

Opið frá 1 juni til 15 juli.

Innarliga á hesum øki er nógvur bleytur botnur við tungu, havtasku og steinbíti, og á hesi leið verður lítið og einki fiskað við línu ella snellu á sumri. Hýsa kemur í august/september, og hvítingur frá juli. Ytri á økinum, einar 6-8 fj. úr landi, ber væl til at tóva, men minni er kanska at fáa, enn inni á umleið 5-6 fj. úr landi. Toskur er ikki nógvur her á sumri, helst minni enn eystan fyri Nólsoynna.

<u>Eystan fyri Suðuroynna.</u>

Eitt øki var onkuntið eystan fyri Suðuroy, 4 fj. úr landið og út móti hellingini móti Suðuroyarbanka. Har varð ikki nógv roynt, tí har rekur hart og botnurin er vánaligur. Nakað av tungu er á leiðini, men tað er ikki kunnugt, hvussu stór hjáveiðan av rundum fiski kann verða har. Mælt verður tí frá at loyva troling innan fyri 12 fj. har.

<u>Vestan fyri Suðuroynna</u> (Økini D1 og D2).

Markini eiga at vera:

Øki D1: 230° rv. úr Akrabergi
230° - - úr Ørnanípuni, frá 12 fj. markinum
og inn at 6 fj. úr landið.

Opið alla veiðitíðina.

Sum frávik frá at loyva troling í hesum øki alla veiðitíðina verður mælt til, at eitt minni øki verður stongt frá 15 juli og restina av veiðitíðini.

Markini fyri hetta eiga at vera:

Øki D2: 230° rv úr Akrabergi
230° - - úr Fløtunestanga undir Reyðabakka
frá 8 til 6 fj. úr landi.

Opið frá byrjan til 15 juli.

Har norðuri í økinum er gott til reyðsprøku, serliga beint um markið norðureftir og inn í økið norðanfyri. Tunga er at fáa har suðuri í økinum. Tann bleyti botnurin er frá umleið 7,5 fj. til 12 fj. í ein vestan og útsynningvestan úr Sumbiarenda. Hettar er eitt gott tunguøki, við størari og nógvari tungu. (Í royndunum við "Skarðhamri" í juni 1989 var um 50 prosent av veiðuni tunga). Eisini er her gott til reyðsprøku. Her er djúpt vatn, o.u. 90 favnar og tí ringt hjá smátrolarum at royna, um ikki veður og streymur eru til vildar.

Økið úti á 10 fj. er soleiðis háttað, at tað kann koma rák í sjógvin, sjálvt í góðum streymi, og tá er illa roynandi við smátrolarum. Hesin streymur er ikki av vindi, og er heldur ikki sjóvarfallsstreymur. Tað er tí helst tann sterki undirstreymurin frá Føroyabankarennuni sum viðhvørt stoytur seg upp í hellingina og inn á grunnin. Økið er eisini ábart til vind, og tað er tí umráðandi, at tann innari parturin av økinum er opin fyri trolveiðu.

Tey flestu árini kemur eitt toskatrekk har inni í økinum seinast í juli, fyrst í august. Hesin fiskur kemur norðaneftir, og hevur helst hildið til á sandgrynnum innari og norðari. Hann kemur vestan fyri Suðuroy út í móti 8 fj. úr landi, og fæst tá væl av honum í troli. Fyrst í september er hann komin suður um 12 fj. úr Sumbiarenda, og hann er tá tøkur fyri fiskiskapi har. Longur úti í troløkinum, á uml. 80 favna dýpi fæst hesin toskur ikki. Tað er fyri at friða henda tosk frá trolingini innanfyri, at skotið verður upp, at øki D2 verður stongt frá 15 juli og restina av veiðitíðini.

Økið vestan fyri Suðuroynna er eitt gott øki, sum, um veðrið er til vildar, kann geva væl av flatfiski, og tað eigur tí ikki at vera stongt.

Vestan fyri Suðuroy (Øki E).

Markini eiga at vera:

Frá 12 fj. markinum til eina linju millum tvey punkt, annað 15 fj. í rv. 230° úr Høvdanum (Skúvoy) og hitt, 6 fj. í rv. 230° úr Ørnanípuni.

Økið eigur at vera opið alla veiðitíðina.

Hetta økið er eitt natúrligt framhald av øki D1. Við markið suðureftir er gott til reyðsprøku, og annars er her eisini nakað av tungu og havtasku. Toskur ferðast onkuntíð um økið, og tá fæst væl av honum eina tíð. Hýsa er eisini at fáa her. Uttarliga í økinum er bleytur og skitin botnur. Innari er, í hvussu so er í støðum, harður botnur.

Innan fyri Skeivabanka (Øki F).

Markini eiga at verða:

Frá 12 fj. markinum til eina linju millum tvey punkt, annað 15 fj. í rv. 230° úr Høvdanum (Skúvoy) og hitt, 9 fj. úr Sandoyarlandinum í rv. 230° úr Høvdasundi.

Opið frá byrjan til 15 juli.

Her er nakað av tungu og til tíðir væl av reyðsprøku, eisini er nakað av ruti, og hetta er góð hýsuleið. Fyri økið er galdandi, at toskur ferðast um tað, og kann tá fáast góður fiskiskapur av toski í einar tveir dagar, men so er liðugt.

Økið kundi verið opið eina tíð av sumrinum, t.d. frá byrjan av veiðitíðini til 15 juli.

Vestan fyri Sandoy (Øki G1).

Markini eiga at vera millum:

Á eina linju 230° rv úr Høvdasundi millum 9 fj. úr Sandoynni og 10 fj. inn úr 12 fj. markinum. Hagani á eina linju 230° rv. úr Selbergsfles og 10 fj. inn frá 12 fj. markinum. Síðan eftir somu linju inn á 4.5 fj. úr Selbergsfles. Harfrá á 61° 58'N, 07° 21'V,og at enda á linjuna úr Høvdasundi.

Økið eigur at vera opið alla veiðitíðina.

Í hesum øki er nógvur bleytur botnur, tó at einkultir harðir skøltar eru, serliga innan fyri økið suður og eystureftir. Í økinum er væl til av flatfiski og havtasku. Umleið 40 prosent av veiðuni kann vera toskur. Við "Skarðhamri" var meðalveiðan hvønn tóvtíma í apríl/juni 1989 av toski, 85 kg, av tungu, 40 kg og av øðrum, 95 kg. Tann syðri parturin av økinum er tað, sum skopuningar nevna "gamla várleiðin". Toskur fæst tó ikki her longur í sama mun sum fyrr um várarnar.

Økið er gott til trol, og útróður er so at siga eingin á sumri. Her rekur ikki serliga hart, og økið liggur bert opið fyri útsynninginum. Tann bleyti botnurin í norðrara partinum av økinum gongur í støðum inn at, ella innum, 3 fj. úr landi, og her verður lítið roynt við línu ella snellu á summri.

Norðaliga innanfyri økið, um 3 fj. úr Vágoynni eru sandgrynnur og sandtungur, umframt sandbotnur (rekaleiðir), har fiskað verður við snellu um summarið. Staðfestingarnar fyri hesar leiðir er ikki neyv, og tí verður mælt frá at loyva troling nærri enn 4.5 fj. úr Vágoynni til nærri kanningar eru gjørdar. Í tí føri kann markið fyribils setast til 6 fj. úr Vágoy. Tá verður kortini eftir til trolararnar ein góður partur av økinum.

<u>Útsynning úr Vágoynni</u> (Øki G2).

Markini kundu veri:

Millum eina linja rv. 230° úr Høvdasundi út á 12 fj. markið, og eina linja rv. 230° úr Selbergsfles út á 12 fj. markið og frá 12 fj. markinum og 10 fj. inneftir.

Í hesum økið fæst mest hýsa og toskur, <u>mælt verður tí frá at loyva troling á hesi leið.</u> Her er nógvastaðni ringur botnur, og tí illa trolandi. Annars er nakað av tunga og ruti at fáa her.

<u>Vestan fyri Mykines.</u>

Í útsynning, í vestan og í útnýrðing úr Mykinesi fæst næstan bara toskur, serliga í juli og august, og tí verður <u>mælt til, ikki at loyva troling á hesum øki.</u>

<u>Vestur úr Mýlingi</u> (Øki H).

Markini eiga at verða:

Millum eina linju 315° rv. úr Barðinum og eina linju 315° rv. úr Mýlingi, 10 og 13 fj. úr grunnlinjuni.

Opið alla veiðitíðina.

Úti við 12 fj. markið er eitt tað frægasta har á leiðini til flatfisk. Her er væl av reyðsprøka og eisini nakað av tungu. Hjáveiðan av toski er tíverri stór (altíð oman fyri 50%, viðhvørt 75%). Tað er tí eitt stórt ivamál um hetta økið eigur at vera opið yvirhøvur. <u>Í tí gamla økinum</u>, ið gongur inn

móti 6 fj. úr landi, kann ikki viðmælast at troling verður loyvd. Veiðan av toski her er ofta 70-80% av allari veiðuni. Har eru tó nøkur smá økir við bleytum botni, har nakað av tungu og reyðsprøku fæst. Eitt teirra er inn við tí gamla norðara markinum móti Mýlingi.

Fuglafjarðaoyðan (Øki I).

Markini eiga at vera:

360° rv. úr Mýlingi
360° rv. úr Rivtanga, frá 12 fj. markinum og inn at 6 fj. úr landi.

Opið allan juni ella juli mánað.

Á hesum øki er nógv av bleytum botni, og lutfallið í veiðuni er umleið ein helvt rut og flatt, og ein helvt toskur og hýsa. Út á summarið verður meira hýsa.

Frá Bispinum vestur á Rivtanga (Økini J og K).

Markini eiga at vera:

Øki J: 360° rv. úr Rivtanga
360° rv. úr Ennibergi

Øki K: 90° rv. úr Ennibergi
360° rv. úr Bispinum

**Bæði økini frá 12 fj. markinum og inn at 6 fj. úr landi.**

Opin alla veiðitíðina.

Bæði økini verða umrødd undir einum. Botnurin er rættuliga skiftandi millum bleytan, sand, og harðbotn, men mest er helst av harðbotni. Eystur og norður úr Fugloy er góður og sléttur trolbotnur í flestu støðum, líka til norður úr Ennibergi, har tað nógvastaðni er ringt at tóva, tó eru onkrar álir, so tóvast kann longur vestur. Á sumri er ikki nógvur toskur her, meðan tað í støðum er gott til flatfisk.

Alt NE úr Fugloy er gott troløki. Eitt øki við bleytum botni er norður úr Kallinum 6 fj. úr landi. Her kann tóvast bæði eystureftir og vestureftir, og eisini út móti 12 fj. markinum. Víðari vestureftir harðnar botnurin, og toskaíblandið verður størri vestur móti Mýlingi, har tað blívur til næstan bara tosk. ( sí tó øki I, Fuglfjarðaoyðan).

**Ymsir reiðskapir á sama øki.**

Hetta, at trolararnir spilla fyri annan reiðskap, kemur sjáldan fyri á flestu økjum, men oftari á øðrum. Tað eru serliga lína og trol sum órógva hvørt annað. Tey krevja bæði nógv pláss, meðan snella er minni plásskrevjandi.

Á bleytum botni koma lína og snella sjáldan í kløtur við trolbátarnar. Orsøkin er, at toskurin har stendur so spjaddur, at veiða við línu ella snellu ofta ikki er lønandi. Viðhvørt verður tó lína sett har, ið trolbátar royna, men línumennirnir ríma gjarna skjótt tí veiðan verður ... lítil.

Eisini hendir tað, at ókønir menn, ofta frítíðarfiskimenn, koma á trolleiðirnar, og órógva trolararnar. Heldur ikki hetta tykist tó at vera ein stórur trupulleiki har, ið botnurin er bleytur.

Á økjum har meira blandaður botnur finnist, eru trol, línu og snellu økini tætt hvørt at øðrum. Higartil hava menn við ymsum reiðskapi ofta tosað seg til rættis, men hetta kann eisini viðhvørt verða ein trupulleiki. Hinvegin, verður hámark sett fyri hvussu nógv av toski og hýsu trolarnir á landleiðini kunnu veiða, vil hesin trupulleikin minka.

**Hjáveiða av toski.**

At summir trolarar á landleiðini burturav leggja seg eftir at fiska tosk, er ongin loyna. Tað verður gjørt við at brúka trol, sum stíga høgt, og við at fiska á leiðum har nógvur toskur er.

Fyri, at fáa menn burtur frá toskaveiðu og yvir til flatfiskaveiðu, eru fleiri møguleikar tøkir.

Reiðskapur. Ein møgulleiki er at gera eina reglugerð, ið forðar fyri, at trolini stíga ov høgt. Men hóast tað, at menn nýta flatfiskatrol, so verður altíð nakað av toski íblandað.

Prísur. Ein annar máti er, at fyri ta nøgd av toski og hýsu, ið er oman fyri eitt ávíst prosenttal av samlaðu veiðuni, verður latin ein væl minni prísur, so tað ikki loysir seg at veiða tosk ella hýsu.

Kvotur. Ein triðji máti er, at hvør bátur fær eina rímuliga kvotu av toski fyri summarið. Tá kvotan er uppi, missur báturin fiskiloyvið restina av veiðitíðini.

Prosent. Ein fjórði møguleiki er, at báturin fær loyvi at hava upp til eitt ávíst prosent av toski í nøgd av veiðuni fyri hvønn túr sær. Hetta prosenttal má vera hægri seinna partin av sumrinum enn fyrra partin, av tí at íblandið av toski verður størri út á summarið.

Hjáveiðan av toski í royndunum við Skarðhamar 1989:

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Eystan fyri Nólsoy | frá 24 | til | 57 | í meðal | um | 40 % |
| Vestan fyri Suðuroy | - 19 | - | 41 | - | - | 26 % |
| Vestan fyri Sandoy | - 20 | - | 65 | - | - | 42 % |
| Vestan fyri Mýling | - 88 | - | 96 | - | - | 93 % |

Bert tvey hál vórðu tikin í Svínoyarhavinum, og tey høvdu um 65 prosent av toski. Vanligt er har, at tað fæst heldur meiri av toski, enn t.d. eystan fyri Nólsoynna.

**Hvar heldur fiskurin til á sumri**

Tunga heldur mest til á bleytum runubotni og reyðsprøka á blandaðum botni, bleytum skelja og sandbotni. Havtaska og steinbítur umleið tað sama.

Toskur hevur á sumri ymsan atburð. Sildafiskur heldur til á sandgrynnum, har trolarar vanliga ikki royna, og er hetta tann toskur sum línu og

snellubátarnir royna eftir. Annar toskur er, sum meira ella minni er spjaddur um allan landgrunnin. Hesin heldur heldur til við botn, etur krabbar og ormar, og eisini sild, hvítingsbróðir og tilíkt, men mest botndjór. Hetta er tann toskur sum trolbátarnir á landleiðini vanliga fáa. Hesin fiskur stendur so spjaddur, at hann fiskast ikki lønandi vid línu ella snellu. Hann stendur tó so fast við botn, at hann fæst í troli, hóast trolið gongur lágt. Toskur, ið fæst vestanfyri Suðuroynna um heystið, vestanfyri Mýling og rundanum Mykines, ber seg tó ikki at sum hesin, men meira sum sildafiskur. Alment kann sigast um hjáveiðu av toski, at millum 20 og 50 prosent er vanlig hjáveiða í flatfiskatroli. Einstøk hál kunnu tó geva meir, tí onkur torva er farin framvið. Vanligt er, at so hvørt sum summarið líður, veksur hjáveiðan av toski.

Hýsa hevur ikki stóran týdning í summartrolingini. I 1988 var hon 9% av allari veiðuni. Hon kemur uppí fiskiskapin frá ólavsøku og úteftir, og mest fæst av hýsu suður úr Mykinesi og eystur úr Borðuni. Men eitt sindur fæst tó aðrastaðni eisini, t.d. uttarliga vestur úr Ørnanípuni og Sandoy. Á ávísum støðum kann hýsa seint á summarið tó vera um 50% av veiðuni. Hetta er onkuntíð hent t.d. eystur úr Borðuni.

**Um veður og streym**

Tá reglugerðin fyri trolingina innan fyri 12 fj. verður gjørd, má havast í huga, at vindur og streymur ofta avmarka veiðimøguleikarnar undir Føroyum. Tí eiga troløkini eisini at leggjast so, at lívd fæst av landi, og at tað er gjørligt at fiska, tá streymurin er harður. Til dømis rekur ikki so hart í økjunum eystan fyri Nólsoynna og vestan fyri Sandoynna sum vestur úr Mykinesi og vestan fyri Suðuroynna.

**Ritgerðir.**

Joensen, Jákup Sverri. 1970 Fiskiroyndir við troli á sumri 1969. Fiskirannsóknir 2: 24 pp.




Kort 1. Øki har mælt verður til at loyva avmarkaða veiðu við troli á sumri.






Mynd 1. Veiða av tungu (t.) undir Føroyum 1924-1984. Meðalveiða 973 t.




Mynd 2. Veiða av havtasku (t.) undir Føroyum 1924-1984.




Mynd 3. Veiða av reyðsprøku (t.) undir Føroyum 1924-1984.




Mynd 4. Veiða av steinbýti (t.) undir Føroyum 1924-1984.







Mynd 5. Meðalveiða (kg/tíma) av toski, tungu og øðrum veidd eystan fyri Nólsoynna og vestan fyri Sandoynna, við ávikavist 120 mm og 135 mm meskavídd í posanum.







<u>Mynd 6.</u> Longdarbýti av kvenn- og kalltungu veidd við 120 og 135 mm meskavídd í posanum.




Mynd 7. Aldursbýti av kvenn- og kalltungu veidd við ávikavist 120 og 135 mm meskavídd í posanum.




Mynd 8. Longdarbýti av toski veiddur við ávikavist 120 og 135 mm meskavídd í posanum.